Jógvan Nybo, formaður í Maskinmeistarafelagnum:

# Solidariteturin skal vísa seg

**Maskinmeistarafelagið roynir at tosa møguligar avloysarar frá at fara umborð á Tjaldri og Brimil fyri teir tólv tænastumenninar, sum søgdu seg úr starvi í farnu viku**

TRÆTA
*Heri á Rógvi*


*Brimil fær nú kanska útlendskar maskinmeistarar, men enn er drúgv hjá pørtunum at semjast*

Fiskiveiðieftirlitið fær ella øllum at døma trupult við at manna Brimil og Tjaldri, eftir at teir tíggju tænastumenninir søgdu seg úr starvi herfyri. Maskinmeistarafelagið arbeiðir dúgliga fyri at halda fólki frá at søkja.

Eftir á manningarlistanum til tey bæði skipini er bert ein maskinmeistari, sum ikki hevur sagt seg úr starvi. Tænastumenn kunnu ikki fara í verkfall, men teir hava sjálvsagt rætt at siga seg úr starvi. Uppsagnartíðin er tríggjar mánaðir, og 1. juni verður dagurin, tá teir endaliga kunnu mynstra av. Við Dimmalætting leygardagin sigur ein av teimum tíggju, at teir síggja hetta sum einasta máta at gera vart við sína misnøgd móti Fíggjarmálaráðnum, ið ikki kann semjast við Maskinmeistarafelagið um nýggjan lønarsáttmála.

Sum tað eisini sæst aðrastaðni á hesari síðuni, so hevur Fiskiveiðieftirlitið søkt eftir nýggjum fólki til maskinurnar á vaktarskipunum. Hetta hevur Maskinmeistarafelagið tó funnið eitt aftursvar til. Felagið hevur nevniliga við lýsingum heitt á allar maskinmeistarar, ið ætla at søkja starv hjá Fiskiveiðieftirlitinum, um at seta seg í samband við felagið.

– Maskinmeistararnir á Tjaldri og Brimli hava tikið eina persónliga avgerð og sagt seg úr starvi. Vit vilja fegnir stuðla teimum, og vit heita tí á allar maskinmeistarar um at seta seg í samband við okkum, um teir ætla sær at søkja, sigur Jógvan Nybo, formaður fyri Maskinmeistarafelagið. Formaðurin sigur, at teir royna at greiða møguligum umsøkjarum frá, hví maskinmeistararnir á vaktarskipunum hava sagt seg úr starvi, og hvør støðan er. Og higartil hevur onkur vent sær til Maskinmeistarafelagið.

Hava tit so megnað at tosa nakran frá at søkja?

– Tað meti eg, at vit hava, sigur Jógvan Nybo, og hann leggur afturat, at hann ikki veit um nakra, sum hevur søkt, síðani Maskinmeistarafelagið fekk trýst nøkur orð á viðkomandi.

Er hetta ikki í veruleikanum at boykotta?

– Hatta eru tíni orð, sigur Jógvan Nybo.

### Langt frá

Spírin til alt hetta rokið eru samráðingarnar millum Fíggjarmálaráðið og Maskinmeistarafelagið um lønarviðurskiftini hjá maskinmeistarunum.

Sáttmálin varð sagdur upp til 1. mars, og nú fara tingingar fram. Hósmorgunin fara partarnir aftur á fund.

– Vit hava roynt í langa tíð at fáa samband við Fíggjarmálaráðið fyri at fáa avgreitt hesar spurningarnar – langt áðrenn 1. mars, men tað hevur ikki eydnast. Sambært Jógvan Nybo er rættiliga langt millum partarnar, og tað eru lønarspurningar, sum eru størstu trupulleikararnir.

Í sambandi við verkfallið hjá Skipara- og Navigatørfelagnum í fjør, segði løgmaður seg tá vera til reiðar til at gera ein enda á verkfallinum við einari løgtingslóg. Hendan møguleikan ber Jógvan Nybo ikki nógva ótta fyri.

– Tú kanst ikki løggeva monnum aftur til arbeiðis, sigur Jógvan Nybo, sum vísir á, at menninir nú ikki longur arbeiða fyri Fiskiveiðieftirlitið 1. juni at rokna.

## Søkja uttanlands

**Fiskiveiðieftirlitið ætlar sær uttanlands eftir arbeiðsmegi til Tjaldri og Brimil**

TRÆTA
*Heri á Rógvi*

Fiskiveiðieftirlitið hevur tikið fylgjurnar av, at vaktarskipini, Tjaldri og Brimil, 1. juni ongar maskinmenn hava.

Elmar Højgaard, leiðari fyri Fiskiveiðieftirlitið og harvið útgerðarmaður fyri Tjaldri og Brimil, sigur, at teir hava søkt eftir nýggjum fólki til Brimil og Tjaldri. Søkt er eftir ellivu fólkum í alt. Ì fyrstu atløgu er søkt í Føroyum, men heilt skjótt verður eisini søkt uttanlands.

–Vit hava ongantíð søkt uttanlands áður, men vit kenna okkum noyddar til tað, tá talan er um so stóran tørv á arbeiðsmegi, sigur Elmar Højgaard.

Hann velur at síggja ljóst upp á støðuna.

– Vit hava langa tíð at finna manning, sigur Elmar.

Til spurningar um átakið hjá Maskinmeistarafelagnum er Elmar Højgaard avvísandi, og hann sigur seg ikki vilja kalla hetta fyri eina kampagnu móti ætlaðu starvssetanunum hjá Fiskiveiðieftirlitinum. Spurdur, hvat hann sigur til, at Maskinmeistarafelagið hevur tosað fólk frá at søkja, er Elmar Højgaard fáorðaður. Hann svarar bert passivt »so« og »ókey«. Fiskiveiðieftirlitið høvdu fyrstu lýsingarnar í bløðunum í síðstu viku, men tað hevur ikki eydnast okkum at fáa greitt at vita, hvussu nógvar ella um nøkur umsókn er komin, men fleiri fyrispurningar hava verið, sigur Elmar Højgaard.

## Sólja farin til verka

**Sólja í Ólavsstovu er nú farin til verka sum aðalstjóri í Almannamálaráðnum. Higartil letur hon væl**

STARV
*Heri á Rógvi*


*Sólja í Òlavsstovu er nú farin til verka í nýggja starvinum sum aðalstjóri. Týsdagin var hon stødd í Norðurlandahúsinum á Grundlógarráðstevnu.*
*Mynd: Jens Kristian Vang.*

Eftir fimtan ár í útlegd í góðum størvum innan grønlendska heimsastýrið, er Sólja í Ólavsstovu vend aftur til Føroya.

Og ætlanin er, at steðgurin verður drúgvur. Sòlja ætlar sær at vera búgvandi fast í Føroyum.

Sólja í Òlavsstovu er farin úr starvinum sum stjóri fyri grønlendska heimastýrið, og hon hevur eisini røkt fleiri aðrar týðandi sessir í Grønlandi.

Hon søkti í sínari tíð starvið sum aðalstjóri í Løgmálaráðnum, men fekk tað ikki. Men í Almannamálaráðnum høvdu tey brúk fyri Sólju, og hon verður nú ovastin fyri embætisfólkunum hjá Páll á Reynatúgvu, landsstýrismanni.

Sólja sigur seg vera glaða fyri at vera komna aftur til Føroya, og hon letur higartil sera væl at.

– Umstøðurnar tykjast at vera góðar, men vit hava ikki nógv fólk til uppgávurnar, sigur Sólja í Òlavsstovu.

Hon sigur, at hon nú skal fáast meira við tað fakliga í hesum starvinum. Í sínum fráfarna starvið var tað meira tann umsitingarligi parturin, dentur varð lagdur á.

Hon er útbúgvin løgfrøðingur á lærda háskúlanum í Keypmannahavn. Sólja í Òlavsstovu byrjaði mánadagin í nýggja starvinum.



# Umsitingini feilar onki


*Jan Christiansen, borgarstjóri í Havn, sigur, at tað er onki galið við umsitingini, sjálvt um ein serstøk byggisamtykt brádliga stakk seg upp og steðgaði arbeiðnum vit síggja á myndini*
*Mynd: Jens Kr. Vang*

**Í sambandi við málið um byggingina av nýggjum bygningi til Kommunuskúlan, har serstøk byggisamtykt brádliga stakk seg upp, sigur Jan Christiansen, borgarstjóri í Havn, at umsitingini feilar onki**

BYGGING
*Ingrid Bjarnastein*

Jógvan Arge, býráðslimur í Tórshavnar Býráð, hevði fyri stuttum at umsitingini í býráðnum, tí hann helt, at hon átti at fingið skil á sínum pappírnum.

Hetta segði Jógvan Arge í sambandi við byggingina av nýggjum bygningi til Kommunuskúlan. Í hesum málinum stakk brádliga ein serstøk byggisamtykt upp, sum umsitingin ikki visti nakað um, og mátti arbeiðið uppá skúlan tí steðgast.

Jan Christiansen, borgarstjóri, er tó ikki heilt samdur við býráðsliminum.

– Tað er onki at ivast í, at okkara umsiting er óføR. Trupulleikin er bara, at manningin er rættiliga nýggj, og ongin hevur arbeitt har so leingi, sigur Jan Christiansen.

### Vansi

Henda serstaka byggisamtyktin sigur, at økið frá Frelsunarherinum, tvørturum Grasagarð og niðan til Kommunuskúlan skal vera fríøkið. Av tí, at barakkirnar eru tiknar niður og ein nýggjur bygningur skal gerast, so kemur hetta undir nýbygging. Og tað kann man sambært serstøku byggisamtyktini ikki.

– Henda serstaka byggisamtykin umtalar eitt so lítið økið, sum ongin á umsitingini visti nakað um. Og sjálvandi er tað ikki nóg gott, sigur Jan Christiansen. Hann leggur afturat, at í løtuni verður alt funnið fram, sum hevur við byggisamtyktir og líknandi at gera, so nakað slíkt ikki tekur seg upp aftur.

Sambært borgarstjóranum er alt viðvíkjandi hesi bygging farið fram á rættan hátt, og trupulleikin hevur sum sagt bara verið tann, at ongin hevur vitað um hesa serstøku byggisamtyktina.

– Hetta er ikki ein byggisamtykt, men ein serstøk byggisamtykt, sum liggur undir eini aðrari byggisamtykt. Sjálvandi er tað ein ávísur vansi í at hava ung fólk, men hetta verður tikið til eftirtektar og alt slíkt verður nú kannað í størri mun.

Ein stór útskifting fór fram í umsitingini á býráðnum tá kreppan tók seg upp. Fleiri fóru frá vegna aldur, onkur doyði og onkur annar fór í annað starv.

Um byggingina av heimi til minnisveik sigur Jan Christiansen, at har er tað sum so tann sami trupulleikin. Í tí førinum var talan um eina útstykkingarætlan.

# Serstaka byggisamtyktin broytast

**Málið um byggingina av nýggjum skúlabygningi til Kommunuskúlan var fyri í byggi- og býarsamskipanarnevndini mánakvøldið. Har var samtykt, at serstaka byggisamtyktin skal broytast so skúlin kann byggjast**

BYGGING
*Ingrid Bjarnastein*



Samtykt er í byggi- og býarsamskipanarnevndini hjá Tórshavnar Býráð, at serstaka byggisamtykin fyri økið frá Frelsunarherinum, tvørturum Grasagarð og niðan til Kommunuskúlan, skal broyast so skúlabygningurin til Kommunuskúlan kann koma upp at standa.

– Málið var fyri í byggi- og býarsamskipanarnevndini, har tað var góðkent at broyta serstøku byggisamtyktina. Nú skal málið fyrst góðkennast í býráðnum, har tað verður lagt fram á býráðsfundi í morgin, sigur Jan Christiansen, borgarstjóri.

Eftir at broytingin er góðkend, skal hon liggja alment frammi í tríggjar mánaðir, har ein og hvør, sum hevur hug til tess, kann fara oman á býráðið at síggja tekningar og gera møguligar viðmerkingar ella mótmæli til byggingina. Síðani verður málið aftur sent til byggi- og býarsamskipanarnevndina, so aftur í býráðið, sum skal samtykkja, at málið verður sent víðari, hóast tað møguliga hevur fingið onkur mótmæli, og at enda skal málið út í Landsstýrið, har tað skal góðkennast enn einaferð.

– Hetta er ein tung prosess, sum tekur langa tíð. Um vit eru heppin, so tekur tað fimm mánaðir, men ein má rokna við einum hálvum ári, sigur Jan Christiansen.

Nú verður eisini arbeitt við at fáa loyst trupulleikan við stóra plásstrotinum hjá Kommunuskúlanum, meðan bíðað verður eftir at fáa serstøku byggisamtyktina broytta.

HYGG HER
CITROËN Mercedes-Benz MITSUBISHI
Ivan Johansen Bilar
www.ivan.fo
Brúktir bilar til sølu
Citroen ZX 1.9TD 5h
km. 160.000, grønur, mai'97
85.000,-
Mitsubishi Galant 1.8i
km. 158.000, bláur, jun'89
35.000,-
Hyundai Accent 1.3i
km. 155.000, grønur, mar'96
25.000,-
Opel Vectra
km. 75.000, svartur, okt'00
170.000,-
Citroen Berlingo 2.0HDI
km. 18.000, m.bláur, des'01
165.000,-
Citroen Saxo 1.5D 3d
km. 57.000, grønur, feb'00
91.000,-
Toyota Avensis 1.8i
km. 43.000, gráur, apr'99
139.000,-
Citroen Saxo 1.5D
km. 70.000, bláur, okt'97
80.000,-
VØRUVOGNAR
Citroen Jumper 2,5TD LH
km. 120.000, reyður, aug'96
120.000,-
Nissan Serena 2,3D
km. 88.000, bláur, mai´97
88.000,-
Nissan Serena 2,3D
km. 102.000, bláur, mai´97
88.000,-
Møguleiki er eisini at royna nýggjar bilar
Vælkomin til
CITROËN Mercedes-Benz MITSUBISHI
Ivan Johansen Bilar
www.ivan.fo
Sosialurin - 311820